

sansir.fo

# SENDIMAÐUR TIL SENDISTOVU FØROYA Í REYKJAVÍK

Starvið sum sendimaður á nýggju sendistovu Føroya í Reykjavík er leyst at søkja.

Sendimaðurin verður partur av uttanríkistænastu Føroya, ið fevnir um Løgmansskrivstovuna og sendistovurnar í Brússel, London og Keypmannahavn.

Uppgáva sendimansins er at virka sambært uttanríkispolitikki Føroya, at umboða føroyskar myndugleikar mótvegis íslendskum myndugleikum og øðrum sendistovum í Íslandi og at røkja sambond við íslendskt vinnulív og mentanarlív.

Arbeiðsøki sendistovunnar verður tí bæði politiskt, vinnuligt og mentanarligt virksemi.

Av tí at talan er um nýggja sendistovu, verður avbjóðingin í fyrstu atløgu at byggja upp sendistovuvirksemi og arbeiðshátt.

**Útbúgvingarlig krøv**
Sett verður sum krav, at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving frá lærdum háskúla ella samsvarandi førleika.

**Starvslig krøv**
Tann, ið settur verður, skal hava góð samstarvsevni, vera áhittin, arbeiða miðvíst og sjálvstøðugt og duga væl at skipa fyri. Hartil skal viðkomandi vera framsøkin, væl fyri í samráðingarhøpi, duga at samskifta bæði formliga og óformliga, hava góðan málførleika og duga at skapa og røkja sambond við einstaklingar, myndugleikar og felagsskapir.

Tað er fyrimunur at hava diplomatiskar royndir. Tað er somuleiðis fyrimunur at hava kunnleika um almenna og/ella privata arbeiðsmarknaðin, breiða samfelagsvitan og innlit í vinnulív.

**Løn og setanartreytir**
Sendimaðurin verður løntur eftir reglunum hjá danska uttanríkisráðnum og eigur lunnindi eftir somu reglum.

Starvið verður sett 1. apríl 2007 ella so skjótt, sum til ber. Viðkomandi verður settur í starv á Løgmansskrivstovuni, og fyrstu trý árini er starvsstaðurin í Reykjavík.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, viðmælum og lívrensli skulu vera Løgmansskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 26. februar 2007. Sendið umsóknir til Løgmansskrivstovuna, postrúm 64, 110 Tórshavn.

Umsøkjarar, ið vilja hava meiri at vita um starvið, eru vælkomnir at venda sær til Marjuna Hanusardóttur, løgmansstjóra, ella Herluf Sigvaldsson, deildarstjóra, á telefon 351010.

---

Løgmansskrivstovan tænir løgmanni í at stjórna landsstýrinum og hevur ábyrgdina av at fyrireika og fremja uppgávurnar, sum løgmaður hevur samsvarandi stýrisskipanini, nevniliga at samskipa og hava eftirlit við landsstýrinum, harumframt fyrisiting og uttanríkismál.

VIT DRAGA EINA LÍNU · VIT SETA SKYNSEMI Í HÁSÆTI · VIT VILJA VITA · VIT BRÓTA SLÓÐ

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

# Tøkk



Hjartaliga takki eg øllum, sum á ymiskan hátt heiðraðu meg á sjeytifimm ára føðingardegnum hin 7. des. 2006 og gjørdu dagin so minniligan fyri meg og familju mína.

**Johild Hansen, Argir**

Stuðulstænastan

## Komið á Háskúla

Í døgunum frá 20. til 23. mars 2007 skipar Stuðulstænastan saman við Føroya Fólkaháskúla fyri tí vælumtókta háskúlauppihaldinum fyri sálarliga sjúk.
Kunnandi fundur í samband við háskúlauppihaldið verður í Løkjukaféini í Løkjutúni 1 á Argjum, týsdagin 13. februar kl. 19.00.
Eisini ber til at melda seg til háskúlauppihaldið við at ringja til Stuðulstænastuna, tlf. 354020.

sansir.fo

NÆRVERKIÐ
Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn,
Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

# Starvsfólk til FT Net

**Kaðalmontørar til FT Net Norðuroki og Miðøki**

Søkt verður eftir kaðalmontøri til FT Net Norðuroki – Eysturoy og Norðoyggjar – og til FT Net Miðøki – Streymoy, Vágar og Sandoy. Eisini kann talan verða um arbeiðsuppgávur í øðrum pørtum av landinum.

Fólkini, ið søkt verður eftir, skulu í stóran mun arbeiða við nýgerð og viðlíkahaldi av kaðalnetinum, sum er kopar- og fipurkaðalar.

Útbúgving og førleikar hjá umsøkjarum:

- Elektrikari, royndir innan elektrikaraøkið ella líknandi
- Viðkomandi má vera opin og duga væl at samstarva
- EDV á brúkarastøði
- Tað er ein fyrimunur, at tann, ið sett/-ur verður kann, arbeiða sjálvstøðugt

Arbeitt verður út frá FT Net í Klingruni í Hoyvík og frá FT Net í Søldarfirði.

Størvini eru lønt sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið, galdandi fyri Føroya Tele.

Gjøllari upplýsingar um størvini kunnu fáast við at venda sær til Sofus Nielsen, økisleiðari í Norðuroki, Andrias Sigurstein í Miðøki ella til Jákup Nielsen, deildarleiðara, á tel 303030.

Umsóknir skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi týsdagin 20. februar 2007 og skulu sendast til

Føroya Tele
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

---

FT Net rekur fjarskiftisnetið hjá Føroya Tele, og fevnir hetta um kaðalnetið, luftborna netið, transmissión og bygningar. Uppgávan er m.a. at tryggja, at allir veitarar fáa somu atgongd til netið. Arbeiðsuppgávurnar hjá starvsfólkunum í FT Net eru at reka og menna netið og selja nettænastur til allar veitarar undir somu treytum.

ft•net

# Fólk søkist

Vit søkja eftir einum álítandi og fyrikomandi starvsfelaga at arbeiða fyrra- og seinrapartar.

Áhugaði kunnu ringja á tlf 50 37 00

Shell støðin í Vestmanna

veitst tú ikki tað?
Sosialurin